# Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

**Spyrjari:** Sirið Stenberg, løgtingsmaður

**Svarari:** Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, landsstýrismaður í almannamálum

**Evni:** Møguleiki at fáa stuðlar í Suðuroynni

**Spurningar:**

1. Hvussu nógv fólk við serligum avbjóðingum fáa stuðul í Suðuroynni?
2. Hvussu nógv fólk hava fingið játtaðan stuðul, uttan at hetta er sett í verk, og hvørjar eru orsakirnar.
3. Hvussu arbeiðir Almannaverkið við at nøkta tørvin á stuðlandi fyriskipanum til fólk, sum bíða eftir stuðli ?
4. Hvørji tilboð hevur Almannaverkið til fólk við demens og ella røktartørvi, sum eru undir 67 ár og búgva í Suðuroynni?

**Viðmerkingar:**
Tænastutilboðini frá Almannaverkinum eru ymisk alt eftir, hvar í landinum fólk búgva. Nøkur øki hava eitt nú tænastur til fólk undir 67 við demenssjúkum, onnur øki hava ikki; og soleiðis er við ymiskum tænastum.

Tað hevur eisini verið frammi, at tað er trupult at fáa stuðul frá Almannaverkinum. Tað hevur verið víst á, at starvsfólkatrotið er ein av avbjóðingunum og í øðrum førum er manglandi játtan ein trupulleiki.

Tað er órógvandi at frætta, at fólk, sum hava fingið at vita, at tey hava rætt til stuðul, ikki fáa tað, tí ongir stuðlar eru at fáa. Spurningurin er tí, hvussu landsstýrið arbeiðir við at bøta um støðuna, soleiðis at fólk kring landið verða tryggjað javnbjóðis rættindi til hjálp, røkt og stuðul.

**Á Løgtingi, 20. oktober 2021**

Sirið Stenberg